Sosialurin

...títt vinnublað





# VINNAN

VINNU- OG HANDILSTÍÐINDI Í SOSIALINUM

TEMA BÁTASTEVNAN VESTMANNA



# At seta kós og hittast

Góðu gestir, góðu bygdarfólk og góðu bátar. Vælkomin á bátastevnu, vælkomin til Vestmanna.

Orðið "stevna" hevur fleiri merkingar. Ein er at stevna móti onkrum, seta kós – henda merking hóskar sera væl til hetta høvi; onnur hóskandi merking er at seta onkrum stevnu, sum merkir at hittast. Hetta er áttandu ferð, at kós er sett móti Vestmanna, og at vit hittast á bátastevnuni.

Bátastevnan er øðrvísi enn flestu aðrar stevnur; summarstevnurnar eru sera líkar, tær eru í stóran mun merktar av ítrótti, kapping, penganýtslu og eisini skundi. Bátastevnan er savnað um bátar, samveru og hugna – og fólk hava stundir at práta. Tað er ongin loyna, at nógv gleða seg meir til bátastevnuna enn til summarstevnurnar.

Eg eri sjálvur ein teirra.

Allar bátastevnurnar higartil hava verið góðar, hóast veðurlíkindini onkuntíð hava verið minni góð. Orsøkin til, at bátastevnurnar hava eydnast væl, er partvíst góð fyrireiking, og at eldsálir skipa fyri. Lat okkum takka teimum fyri teirra stríð og vóna, at teir halda fram og duga at seta gott fólk við.

Martin Joensen byrjar sína kvøðu til heimbygdina við hesum ørindi, sum lýsir løtuna, tá fyrstu vestmenningarnir komu til bygdar:

*Komu tey ein kaldan heystardag*
*av havinum og nomu hendan stað.*
*Tey funnu trygga havn,*
*og góvu tær títt navn,*
*favnur tín var opin Vestmanna.*

Árstíðin er skeiv, men eg vænti tó, at bátastevnugestirnir fara at hava somu kenslu 16. mai sum ímyndaðu niðursetufólkini: Her er trygg havn, og Vestmanna tekur móti tykkum við opnum favni. Enn einaferð: Vælkomin til Vestmanna.

**Karl A. Olsen**
**borgarstjóri**